Álit

í

løgtingsmáli nr. 33/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin) og løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin) (Fylgibroytingar í sambandi við, at nýggj ársroknskaparlóg verður sett í gildi o.a.)

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 6. november 2025 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsið og landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg.

Hvat grannskoðaravinnuni í Føroyum viðvíkur er støðan hon, at skulu føroyskir grannskoðarar og grannskoðanarfyritøkur framhaldandi kunna átaka sær uppgávur fyri føroyskar fyritøkur, sum virka á altjóða stigi (t.e. figgjarfyritøkur og fyritøkur, ið eru skrásettar á virðisbrævaskálum) má lóggávan dagførast samsvarandi altjóða gongdini.

Broytingarnar í lógini eru í høvuðsheitum avleiddar fylgibroytingar, sum standast av broytingunum í ársroknskaparlógini, umframt smærri tekniskar og málsligar broytingar, sum stava heilt afturi frá, at lógin varð sett í gildi í Føroyum.

Yvirskipað er endamálið við uppskotinum sostatt at tryggja, at føroysk lóggáva á økinum er á sama støði sum lóggávan í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, heruppií serliga ES- og EBS-londini.

Lógin førir ikki við sær øktar umsitingarligar byrður fyri føroyskar fyritøkur/feløg.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 20. november 2025

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Árni M. Dam	